norden

Nordplus Vaksin

# Stuðul frá Nordplus - Vaksin

**Nordplus vaksin er ætlað at menna samstarvið fyri fólksliga upplýsing og undirvísing av vaksnum.**

Stuðul verður veittur til flytføris- og samstarvsverkætlanir, sum kunnu menna nýggj hugskot, háttaløg (metodur), tilfeingi, partar av skeiðum o.tl. Bæði luttakarar og lærarar kunnu vera við í samstarvinum. Harafturat verður stuðul veittur til at kunna um royndir hjá hvørjum øðrum, til kortlegging og útgreining av ávísum økjum og til at byggja nýggj netverk upp.

- Stuðul kann td. vera veittur til fyrireikingar til verkætlanir at fyrireika vitjan hjá undirvísarum og øðrum við ábyrgd fyri frálæru.
- Stuðul kann vera veittur til uppihald í samband við eftirútbúgving, lestur ella undirvísing hjá lærarum og øðrum.
- Skifti millum luttakarar í fólkaupplýsing og í undirvísing fyri vaksin

**Umsóknarfreistin til Nordplus Vaksin er 1. oktober 2005, 1. mars og 1. oktober 2006**

Umsóknarfreistirnar til hinar fýra Nordplus-skipanirnar eru:
Nordplus Junior - Umsóknarfreistir: 15. mars 2006
Nordplus Granni - Umsóknarfreistir: 1. februar 2006
Nordplus Mál - Umsóknarfreistir: 17. oktober 2005, 1. februar og 15. oktober 2006
Nordplus - Umsóknarfreistir: 1. februar 2006

Sosialurin 341800

Meiri fæst at vita á www.ciriusonline.dk ella hjá Altjóða Skristovuni í Tórshavn. Tlf. 322065 - t-post: ask@ask.fo - www.ask.fo

norden

Nordplus Mál

# Stuðul frá Nordplus - Mál

**Nordplus Mál skal menna málfatanina og málfelagsskapin millum norðurlondini og styrkja altjóða støðuna hjá málunum.**

Nordplus Mál er ein skipan, sum er ætlað at vísa á týdningin av, at tey norðurlendsku málini verða styrkt, soleiðis at norðurlendskt samstarv eisini í framtíðini verður á norðurlendskum málum.

Stovnar, feløg og persónar kunnu søkja um stuðul til tiltøk og verkætlanir, sum fremja fatanina av norðurlendskum málum, styrkja kunnleikan um norðurlendsku málini, fremja ein demokratiskan málpolitikk í Norðurlondum og styrkja støðuna hjá norðurlendsku málunum í Norðurlondum og uttan fyri Norðurlond.

Stuðul verður latin til hesi endamál:
- Skeið og ráðstevnur
- Gransking og kanning
- Orðabóka- og terminologiarbeiðið
- Undirvísingartilfar og útgávur
- Máltøkni verkætlanir
- Uppbygging av netverkum við denti á mál og á upplýsingararbeiðið

**Umsóknarfreistin til Nordplus Mál er 17. oktober 2005, 1. februar og 15. oktober 2006**

Umsóknarfreistirnar til hinar fýra Nordplus-skipanirnar eru:
Nordplus Vaksin - Umsóknarfreistir: 1.oktober 2005, 1. mars og 1. oktober 2006
Nordplus Granni - Umsóknarfreistir: 1. februar 2006
Nordplus - Umsóknarfreistir: 1. februar 2006
Nordplus Junior - Umsóknarfreistir: 15. mars 2006

Sosialurin 341800

Meiri fæst at vita á www.ciriusonline.dk ella
hjá Altjóða Skristovuni í Tórshavn. Tlf. 322065 - e-mail: ask@ask.fo - www.ask.fo

Rúsdrekkasøla Landsins

# Lýsing eftir nýggjum stjóra til Rúsdrekkasølu Landsins

Vinnumálaráðið søkir eftir nýggjum stjóra til Rúsdrekkasølu Landsins.

**Arbeiðsøkið**
Høvuðsuppgávurnar hjá landsfyritøkuni eru at:

- Fyrisita einkarættin at innflyta og selja rúsdrekka
- Tryggja kundunum nøktandi úrval innan ymisku vørubólkarnar umframt góðsku.
- Vera við í arbeiðinum at upplýsa um vandan við rúsdrekka

Landsfyritøkan er skipað sambært løgtingslóg.

**Starvið**
Stjórin hevur ábyrgdina av at leiða, reka og menna landsfyritøkuna, og skal fremja tær uppgávur og ætlanir, sum eru lagdar til Rúsdrekkasølu Landsins.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum av umsøkjarunum, at teir hava:

- hóskandi útbúgving
- leiðsluroyndir innan almenna ella privata umsiting
- viðkomandi royndir innan arbeiðsøkið
- góðar samstarvseginleikar umframt mennandi leiðslustíl
- áræði og eru sjálvstøðugir.

**Vit kunnu bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt, spennandi og avbjóðandi starv í einum umhvørvi á høgum fakligum stigi, ið tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa. Til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við nógvum samskifti úteftir. Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har ið tú kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við politisku myndugleikarnar, áhugabólkar í samfelagnum og starvsfólkini hjá landsfyritøkuni. Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgvingum.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður lønt ájavnt 36. lønarflokk hjá Tænastumonnum Landsins, tó uttan at talan er um tænastumannastarv. Viðvíkjandi setanartreytum annars verður víst til avvarðandi sáttmála. Starvsheitið er stjóri, og tænastustaðurin er Rúsdrekkasøla Landsins. Setanarøkið er Vinnumálaráðið og hini stjórnarráðini umframt stovnar undir.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:

**Vinnumálaráðið**
Tinganes
Postsmoga 377
110 Tórshavn

Umsóknirnar skulu verða Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi **3. oktober 2005.**

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Starvið verður sett skjótast til ber. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Vinnumálaráðið á tlf. 35 60 60 ella vmr@vmr.fo

*Rúsdrekkasøla Landsins er landsfyritøka undir Vinnumálaráðnum og hevur einkarætt til innflutning og sølu av rúsdrekka. Rúsdrekkasøla Landsins skal útvega kundunum góðskuvørur, skapa fortreytir fyri einum vælvirkandi søluneti kring landið, og samstundis virka fyri, at tey rúsdrekkapolitisku málini, ið Føroya landsstýri setir, verða nádd.*

*Rúsdrekkasøla Landsins er stovnsett sambært §4 í løgtingslóg nr. 20 frá 10/3-92 um innflutning og sølu av rúsdrekka við seinni broytingum. Reglur fyri virksemið hevur landsstýrið fyrisett í kunngerð nr. 144 frá 20/10-92 um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins.*

*Rúsdrekkasøla Landsins hevur 6 deildir kring landið. Høvuðsskrivstovan er í Tórshavn. Tilsamans 34 fólk arbeiða hjá landsfyritøkuni.*